DAGSINS MEINING

Hægri prísir og færri túrar - útjaðarapolitikkur í verki!!!

Vit taka fult undir við sjónarmiðunum hjá dímunarbóndanum, Óla Jákupi, í samrøðu við blaðið fyri eini viku síðani: "Ein góð, álítandi og ikki ov kostnaðarmikil samferðsla er fyritreytin fyri at varðveita búplássini í úroyggjum og øðrum útjaðaraøkjunum".

So satt sum tað er sagt. Somuleiðis sigur formaðurin í Útoyggjafelagnum, at tað sýntist so ljóst, tá ið samgongan varð skipað í 1998 við økismenningini og útoyggjapolitikkinum á dagsskránni, men nú er hann - bara sløk fimm ár seinri - meira ørkymlaður um framtíð útoyggja.

Vit kunnu vissa Óla Jákup úr Dímun um, at tað er ikki bara hann, sum hevur fingið politiskar "timburmenn". Henda dagin, tingið umrøddi prísirnir hjá Strandferðsluni, komu menn, kropp av kroppi, upp á pallin. Nei, tað má ikki henda, at prísirnir hjá Strandferðsluni hækka eini 20 prosent á summum leiðum.

Men tað eru ikki bara prísirnir, sum hækka. Túratalið skal eisini skerjast, um roknistykkið hjá Strandferðsluni skal ganga upp. Og hví? Tí at samgongan samtykti eina fíggjarlóg, sum gevur SL trengri karmar at virka undir! Og hetta er júst øvugt av tí, sum formaðurin í Útoyggjafelagnum mælir til: at kanna møguleikan fyri at sigla og flúgva títtari!

Eftir regnváta fólkafundin á Kirkju fyri hálvum fjórða ári síðani, lovaði løgmaður, at nú skuldi nakað gerast til frama fyri útoyggjarnar. Long tíð gekk, men umsíður valdi løgmaður eina nevnd, sum fyri sløkum tveimum árum síðani legði eitt frálíkt og rúgvismikið álit - Útoyggjaálitið - fram. Síðani er Útjaðaraálitið eisini komið.

Bæði mæla til eina betri samferðslutænastu, um fólk skulu trívast í útjaðaranum. Men hvat hendir? Jú, hetta sama landsstýrið, við einum klípi afturat, førir ein politikk, sum er beint øvugt av øllum tí, sum hesi álit siga. Áðrenn fíggjarlógin varð samtykt, vístu vit í hesum teigi á, at ein minni játtan til Strandferðsluna fór at merkja hægri prísir og færri túrar. Eingin reaktión. Og samgongan samtykti fíggjarlógina við lægri játtan á fleiri økjum. Hetta er bara annað málið, rumbul er um. Fleiri koma undan kavi, tá avleiðingarnar gerast veruleiki.

Útoyggjafelagið mælir til at kanna møguleikarnar fyri at hava eina samhaldsfasta prísskipan hjá Strandferðsluni. Grundgevingar felagsins eru góðar. Vit skulu ikki taka vónina frá felagnum, men lítið er at ívast í, at gongdin verður júst tann øvugta? Hægri brúkaragjøld og eitt minni samhaldsfast samfelag er politikkurin á øllum økjum! - Hví skulu vit so vænta, at ferðaprísirnir skulu javnast?

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Lítið fantilsi á tænastustøðinum hjá Strandferðsluni

Rúna Sivertsen

Seinasta fríggjakvøld varð Dúgvan brádliga tikin úr sigling. Tá ferjan ikki kom til ásettu tíðina, ringdu ferðafólk á Farstøðina, men ikki fyrrenn farið var av allari tíð, kundu tey á Farstøðini upplýsa, nær siglt varð aftur

Veðrið var gott fríggjadagin og tey, sum skuldu um Leirvíksfjørð henda dagin, óttaðust ongar avlýsingar.

Men tá Dúgvan skuldi sigla av Leirvík klokkan 21.30, var einki skip í eygsjón. Bilrøðin á bryggjuni var stór, og fólk gingu ímillum fyri at fregnast um, hvat mundi vera galið. Men eingin visti nakað, og á Farstøðini høvdu tey eingi boð fingið.

Onkur av ferðafólkunum, sum dagliga ferðast við Dúgvuni, ringdi umborð. Tá fekst at vita, at teir máttu leggja skipið ein túr. Hesi boð komu tó ikki til øll, sum bíðaðu.

Tá ferðafólkið kom umborð, var alt sum um einki var hent - eingin frágreiðing ella umbering um háttalaran.

Manningin gav boð

Summi av ferðafólkunum, sum bíðaðu klaksvíksmegin, fingu boð frá manningini, at báturin mátti leggjast ein túr. Men henda fráboðan kom ikki til øll, og eingin frágreiðing var sett upp við ferjuleguna.

Seinni frættist, at Dúgvan hevði fingið hol á gronina undir sigling í næstseinastu viku, og at hetta var orsøkin til, at nevndi túrur varð lagdur burtur ímillum.

Tey flestu, sum dagliga ferðast um Leirvíksfjørð, hava fartelefonnummarið á Dúgvuni. Tey hava møguleikan at ringja umborð, tí manningin er altíð fús at svara, tá ringt verður.

Men hetta er ein tænasta, sum skal veitast á Farstøðini og ikki av manningini á strandfaraskipunum, sum hevur annað at gera enn at svara telefonini, meðan siglt verður.

Tað hevði ikki kostað Strandferðsluni nógvan pening at sett upplýsingar um broytingar upp við ferjulegurnar.

Dugnaleys leiðsla

Ferð eftir ferð standa fólk í Leirvík og bíða, tá Dúgvan siglir á Fuglafjørð. Eitt skelti við frákoyringina til Leirvíkar, hevði loyst tann trupulleikan.

Eingin - heldur ikki leiðslan á Strandferðsluni - er harri yvir veðri ella óhappum. Men leiðslan hevur ábyrgd av, at ferðafólk verða upplýst, og at avlýsingar eru til so lítlan ampa sum gjørligt, bæði fyri manning og ferðafólk.

Leygardagin varð Ternan sett í sigling, meðan Dúgvan er á beding fyri at tetta holið á gronini.

Og so er at vóna, at werørini á damutoylettinum verða tett samstundis, so tær kvinnur, ið noyðast at "træde af på naturens vegne" á ferðini um Leirvíksfjørð, ikki kódna í ótespiliga deyminum.

Viðmerkingar til tíðindastubba í Degi og Viku 23. januar 2003

Klæmint Weihe
Tórshavn tann 24. januar 2003

Í degi og vika í gjárkvøldið var innslag við Hans T. Olsen um mín persón. Eg havi hesar viðmerkingar til tað sum kom fram.

Á stýrisfundi í SEV tann 16. november 2002, varð semja gjørd um, at undirritaði skuldi taka seg úr nevndini fyri P/f Norðoyatunnilin. Eg var iki hjástaddur á fundinum, men tók undir við avtaluni í telefonini. Sama kvøld ringdi eg til Bjarna Djurholm, landsstýrismann og boðaði honum frá semjuni. Semjan varð eisini send fjølmiðlunum sama dag.

Eftir var so at finna eitt passandi tíðspunkt at fara úr nevndini. Á stýrisfundinum var m.a. árligi ársaðalfundurin í P/F Norðoyartunnilinum nevndur. Tá hetta ikki varð ásett í semjuni, hevur undirritaði eftirlýst einari nærri áseting av hesum.

Tað hevur ikki eyndast at fáa eina greiða ábending um hetta. Nevndararbeiðið í P/F Norðoyartunnlinum skal halda áfram, og stórar avgerðir skulu takast í nærmastu framtíð. Eg gjørdi tí av mikudagin tann 22. januar 2003 at boða Bjarna Djurholm frá, at eg ynskti at verða loystur úr starvi skjótast tilber.

Eitt annað mál, sum varð umrøtt í sendingini, var ógegni mítt í samband við P/F Vágatunnilin. Sagt skal verða frá, at eg ikki havi luttikið í málsviðgerðinii sambandi við P/F Vágatunnilin síðani november 2002.

Á stýrisfundinum tann 17. januar 2003 var eg hjástaddur undir málsviðgerðini. Hetta var eftir, at stýrisformaðurin hevði spurt fundarluttakararnar um teirra hugsan. Eingin ynskti, at eg fór av fundinum, men fleir iynsktu, at eg varð verandi, tí teir høvdu spurningar itl mín. Eg svaraði settu spurningunum.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn

E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Støðd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Rás Tórshavn:

Harmasøga og bluffnummar

Jógvan Arge
Býráðslimur fyri Tjóðveldisflokkin

Jóanis Nielsen var ikki langt av leið, tá hann í Fregnum skrivaði um bluffnummarið hjá Tórshavnar Kommunu og Føroya Tele um sjónvarpspakkan, sum er "nóg mikið til at geva einum neyðarsligum húsarhaldi slagsíðu".

Málið er líkasum snírt ígjøgnum Tórshavnar Býráð. Upp undir endan varð tað einans viðgjørt sum eitt fíggjarmál, og fíggjarnevndin einsamøll tók avgerð um at avreiða útgerðina hjá Rás Tórshavn til Føroya Tele. Avgerðin um at steðga rásini man vera tikin umsitingarliga.

Hetta hevur havt við sær, at tann, sum ikki heldur seg hava nóg mikið við SvF, má antin keypa sær frystiboksina hjá Televarpinum ella fáa sær eina parabol-tænasta – við egnum parabolí ella í eini parabolskipan.

Tann peningaliga slagsíðan kemur av, at Rás Tórshavn hevur verið ein kommunal tænasta, sum onki hevur kostað brúkarunum. Skulu hesir brúkarar nú út um SvF, mugu teir gjalda í dýrum dómum.

Í Havn eru 6000 húsarhald. Tey mugu nú gjalda einar 3000 krónur árliga fyri nýggju tænastuna. Tað merkir, at Tórshavnar Kommuna við sínum stigi hevur álagt sínum borgarum 18 milliónir krónur í meirútreiðslum um árið fyri eina tænastu, sum kostaði kommununi eina millión krónur.

Hvørki mentanarnevndin ella sjálvt býráðið, sum fyrr hava viðgjørt mál um Rás Tórshavn, hoyrdu orð ella eið til hetta málið eftir, at býráðsformaðurin fyri einum ári síðani fekk býráðið at samtykkja at fara undir tingingar við Føroya Tele at kanna hvørjar møguleikar vóru í framtíðini.

Próvgrundin at fara undir hesar samráðingar var, at TV3 var komið við eini rokning, sum skuldi vera upp á 800. 000 krónur um árið.

Mentanarnevndin og býráðið hava onganstíð fingið at vita, hvat kom burtur úr kanningunum hjá Føroya Tele, men kunna staðfesta, at fíggjarnevndin hevur selt Føroya Tele Rás Tórshavn fyri eina knappa millión uttan at býða út.

Staðfestast kann eisini, at Føroya Tele hevur ikki verið ført fyri at bjóða viðskiftafólkunum hjá Rás Tórshavn rásina hjá TV3, sum knúturin stóðst av og eftirhondini var vorðin rættiliga viðkomandi hjá hyggjaranum.

Í síni tíð var tað Tórshavnar Býráð sjálvt, sum tók stig til endurvarpingarstøðina Rás Tórshavn.

Eitt høvuðsargument var, at býráðið vildi ikki hava parabolar á hvørjum húsi, tí hetta fór at lýta umhvørvið. Kommunan rindaði kostnaðin fyri úgerð og rættindi, og havnarborgarar fingu tænastuna fyri onki.

Hetta var ein kommunal tænasta, sum gleddi fólk, men hon skuldi partú avhøvdast tí, at TV3 loksins hevði reist uggafjarðarnar.

Hvat fingu vit afturfyri? Ein strongdan borgaraskara, sum í alla framtíð má taka djúpt í lumman sjálvur fyri at fáa sama sjónvarpsútboð aftur. Í mongum førum verður hann eisini trýstur til at lýta býin við einum stórum stálkampi.

Hetta er harmasøgan um eina kommunu, sum í 21. øld steðgaði eini fram úr tænastu og vendi 180 stig orsakað av eini rokning, sum hevði kostað hvørjum húsarhaldi 11 krónur um mánaðin.

Tórshavnar Kommuna hevur eina fíggjarætlan upp á 435 milliónir krónur, sum skattaborgararnir rinda. Har er framvegis rúm fyri at varðveita Rás Tórshavn - við ella uttan TV3.

Kári Højgaard formaður í Sjálvstýrisflokkinum

TÍÐINDASKRIV

Á landsfundi Sjálvstýrisfloksins á Glyvrum leygardagin var semja um, at Sjálvstýrisflokkurin framhaldandi skal virka fyri, at yvirtøkur verða framdar stigvíst og eftir avgerð, sum vit sjálvi taka, og fegnast um at tað nú hevur eydnast flokkinum at arbeiða eftir leisti Sjálvstýrisfloksins. Hetta er eisini galdandi í samband við yvirtøkuna av fólkakirkjuni, sum má gerast í samráð við allar partar, ið varða av kirkjuni, og umboðum fyri politisku flokkarnar.

Landsfundurin ger vart við, at tað er ongin loysn at geva skattalætta við aðrari hondini og áleggja gjøld og hækka prísir við hinari hondini, men arbeiðast má við rationaliseringum og sparingum. Samgongan í felag hevur ábyrgd av at útjaðarin ikki fær verri umstøður.

Landsfundur Sjálvstýrisfloksins átalar vánaliga stevið í samgonguni, at persónar í alt ov stóran mun, royna at profilera seg sjálvar og sínar flokkar, heldur enn at loysa málini innanhýsis í samgonguni.

Landsfundurin fegnast um at flokkurin við sínum politiska leiki hevur eydnast at ment um persónliga og vinnuliga frælsi, og umhvørvi, vælferð og trivnaður hjá øllum landsins borgarum er styrkt munandi við floksins luttøku í samgonguarbeiðinum.

Fráboðan:
Á fundinum var full semja um at velja Kára P. Højgaard til floksformann, og Eyðun Elttør til næstformann.

Nýggj landsnevnd. Landsfundurin valdi eisini nýggja landsnevnd. Nevndin hevur skipað seg við Lassa Klein fyri Eysturoynna, sum formanni í landsnevndina og Ásu Olsen fyri Suðurstreymoy sum næstformanni. Hinir nevndarlimirnir eru: Dan Lamhauge fyri Unga Sjálvstýri, Sigvald Zachariasen fyri Norðurstreymoy, Jan Joensen fyri Norðoyggjar og Rosely Reynstind fyri Vágarnar. Hesi umboð vóru vald í starvsnevndina: Klæmint Olsen og Petur Olivar í Hoyvík.

Lær meg - Carl Jóhan

Góði Carl Jóhan Jensen, tú sum ert so greiður, gløggur og góður. Fyrigev mær mína fávitsku. Og lat tú meg bert leska ein løgg av tíni kunnleikans ótømandi keldu, so eg skilji heimin.

Fyrigev mær eisini mín frekleika og fyll meg við tínum fyrikomandi og frílynta lyndi.

Eg drýpi høvur í skomm, eftir at hava lisið tínar avdúkandi sannleikar um meg í sannleikans tíðarriti. Tú hevur púra rætt. Eg eri fávitskutur og frekur - havi hvørki hylling ella høvd uppá samfelagsins viðurskifti. Heldur ikki kanningarstjórafrágreiðingina, sum kvetti høvdið av Jørgeni Niclasen.

So góði, greiði, gløggi Carl Jóhan, lær tú meg og okkum onnur deyðiligu, hvussu sannleikin hongur saman. Væta okkum við tíni kunnleikans keldu, og sig okkum veruligu søguna um kanningarstjórafrágreiðingina og Jørgen Niclasen, sum bert tú skilir.

Men minst til, góði Carl Jóhan, tú skrivar til okkum fávitskutu. So lat vera við at oysa tín kunnleika burt á veldugum síðum í sannleikans tíðarriti. Væta okkum heldur við skilliga sannleikanum í eini grein, sum ikki er longur enn 3.000 tekin. Eg bíði spentur eftir at læra - Carl Jóhan.

E.S.: Tú mást orsaka, at hendan viðmerking ikki bert er send til sannleikans tíðarrit, men eisini til fákunnugu miðlarnar.

Við eyðmýkt
John Johannessen, tíðindamaður

Privat fjøll og mjólkarprísur

Jógvan Joensen

Annars haldi eg at Karthago skal leggjast í oyði. Soleiðis endaði ein rómverskur politikari allar sínar røður, líkamikið hvat tær vóru um, og endin var jú at Kartago var javnað við jørðina.

Í Føroyum hava vit fingið nakað líknandi. Her eru tað bóndirnir, sum siga at teir skulu hava fjøllini fyri einki frá landinum. Antin teir tosa um veðrið ella mjólkaprísir, so verður tað ikki gott fyrrenn teir sleppa at eiga fjøllini.

Í nógv hundrað á hevur tað verið soleiðis, at umleið helvtin av jørðini hevur verið privat, og helvtin hevur verið almenn. Tó ikki meira almenn enn so, at maðurin sum situr við einum festi veit, at tá hann gevst fær eitt av børnunum hjá honum festi. Hyggja vit so eftir hvørjir garðar klára seg best, er tað jú lætt at siggja at tað eru teir almennu garðarnir, sum kunnu kallast landbrúk, meðan tann privata jørðin verður brúkt til hobby hjá onkrum sum hevur pengar nokk at keypa sær nakrar gyllin.

Fyri eini tjúgu árum síðani fóru nakrir av teimum almennu bóndunum at investera í neytafjós. Teir læntu so nógv av pengum, at teir hava ongan møguleika at gjalda láni aftur, sjálvt um landi lænti teimum pengarnar so at siga rentufrítt. Tað vil siga at hesir menn klára ikki at dríva eitt virkið, sum teir gjalda eina symbolska leigu fyri, og sum teir kunnu læna íløgukapital rentunfrítt frá landinum til. Hvussu ólukkan skulu teir so klára tað, tá teir mugu gjalda fullan prís fyri bæði jørð og fjós. Eg skilji tað so ikki.

Eg skilji heldur ikki hví ólukkan teir ikki keypa sær eitt fjall ella tvey, tá teir nú halda at tað er tað einasta saliggerðandi. Helvtin at øllum fjøllunum í Føroyum eru jú privat ogn, og prísurin er marknaðarprísur, so har er bara at fara í gongd.

Annars er gongdin aðrastaðni tann, at mjólk verður framleidd í risastórum fjósum við fleiri hundrað neytum. Tað gevur eina ódýra framleiðslu, og góðar arbeiðsumstøður. Tá vit hugsa um at meginparturin av øllum teimum ógoldnu fjósunum í føroyum eru gomul og niðuslitin, dugi eg væl at síggja at bóndirnir hava eitt problem. Men problemið kann ikki loysast við at koyra fjøllini í lumman á nøkrum fáðum monnum. Eini tvey, kanska trý fjós fara at leverað alla tað mjólk vit hava brúk fyri, tá fáa vit kanska mjólk fyri ein hampuligan prís. Í staðin fyri at framleiða mjólk, fara bóndurnir at selja græs til fjósini.

Kann onkur forrestin siga mær, akkurát hvar í mjólkarframleiðsluni tað er, man skal brúka eitt fjall?

Mær vitandi verða fjøllini í Føroyum brúkt til seyðaframleiðslu, og seyðabóndurnir skylda ikki hasar milliónirnar, ikki teir við skili í, í hvussu er.